## Tríggir dystir avlýstir

Veðrið spældi av álvara eitt puss, tá næsta umfarið í kappingini um Løgmanssteypið var á skránni leygardagin. Í Leirvík og á Streymnesi blásti dómarin av, eftir at spælararnir høvdu roynt set eina løtu, og í Gøtu byrjaði dysturin ongantíð. Snøægt sagt, so var veðrið ikki til forsvarligt fótbóltsspæl, og hesum tóku dómararnir avleiðingarnar av.

## Tryggur ÍF-sigur

Fuglfirðingar høvdu kanska á pappírinum léttastu uppgávuna, tá teir áttu heimavølli móti Undrinum. Eingin ivi var heldur um úrslitið í dystinum, sum ÍF vann 11-1. Við sigrinum er ÍF til reiðar at spæla fjórðingafinalu, tó at tað enn ikki er greitt, hvat mótstøðuliðið verður í hesari.

# AB skapti sensatiónina

**B36 kann helst iðra seg um undirmetingina av mótstøðuni, men tað skal einki takast frá AB, sum við rætta stríðsandanum sendi steypavinnararnar út í kuldan**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Argjamenn stríddust betri enn teir í B36, og hetta var fremsta orsøkin til mest óvæntaða úrslitið í steypakappingini*
*Mynd: Einslistir*

Fyrsta sensatiónin í steypakappingini varð veruleiki leygardagin, tá B36 legði grasliki til AB, sum var komið á grannavitjan.

Hóast Formula-status, so eru tey fægstu í iva um, at fótbólturin í høvuðsstaðnum fyrst og fremst snýr seg um HB og B36. Ella soleiðis var tað í øllum førum undan leygardegnum.

### Trý korter eftir ætlan

Tí AB megnaði nevniliga at taka alt og øll á bóli, tá teir sendu steypavinnararnar inn aftur í syðra húsi við dygg-um 3-1 tapi.

Talan var ivaleyst um klassiskt dømi, har favoritturin heldur seg hava vunnið, áðrenn dysturin er blástur ígongd, og í so máta var talan um dýrt keyptan lærupening.

Fyrra umfarið var annars ikki tað stóra, sum bendi á, at talan skuldi verða um nakra sensatión. B36 hevði lotið undan, og hóast hetta argaði nakað, tá spælt varð djúpt, so var yvirvágin sera greið. Eisini hóast Rógvi Poulsen við eini framúr hælfintu skapti AB ein stóran møguleika at leggja seg á odda.

Men annars tók B36 alt meira yvir. Nakrir møguleikar vórðu skaptir, og teir løgdu seg eisini á odda, tá Ovi Nysted átti seinasta fótin í trunkaspæli eftir horna.

### Klassiskt dømi

Og so tóktist kósin vera sett. Og tað mundu teir í B36 í øllum førum halda sjálvir.

Hóast lotið var ímóti eftir steðgin, so tóktust teir hava tamarhald á støðuni. Men teir megnaðu tó ikki at avgera, og tað var sum at rætta ein ávísan harra lítlafingur.

Ella kanska skuldu vit sagt hondina, tí B36 rættu sjálvir AB eina hjálpandi hond, tá hendan varð brúkt til at steðga bóltinum í brotsteiginum. Talan var kanska um ósketni, tá hetta hendi, men dómarin stóð væl fyri, og so kundi Hendrik Rubeksen ósvikaliga trygt senda bóltin í síðunetið.

Og so tendraði AB av álvara. Bara fýra minuttir seinni lá bólturin aftur í B36-málinum. Hesa ferð hevði AB fríspark í vinstru, og tá hetta varð sent innfyri, kundi Fróði Clementsen við høvdinum stýra bóltinum í málið.

At talan var um klassiskt tømi um undirmeting, prógvaði næsta løtan helst. B36 megnaði alt fyri eitt at trýsta seg fram til tveir heilt góðar møguleikar, men so steðgaði púrasta upp. Partvíst, tí spælararnir nú mundu halda, at »tað gongur nokk kortini«, og partvíst tí AB nú sansaði, at sensatiónin var heilt nær.

### Perlumál avgjørdi

Argjamenn løgdu seg nú longur aftur, so øll hol í verjuni kundu tippast. Og tá B36 ikki megnaði at brlyta bóltin nóg skjótt runt, megnaðu gestirnir uttan teir heilt stóru trupulleikarnar at verja borg.

Og so kundi málrevurin, Súni Fríði Barbá, eisini punktera heimavónina, tá hann tamdi frísparksinnlegg, áðrenn hann hamraði bóltin í meskarnar til 1-3.

Og so mundi fagnaðurin ongan enda tikið í vestara skýlinum. Frustratiónirnar hjá teimum hvítu øktust, og hóast onkur mundi ilskast á dómaran, so skuldu teir helst vera fegnir um, at tað hóast alt eydnaðist at enda við 11 monnum á vøllinum.

Og so kundu áskoðararnir tysja inn á vøllin, tá seinasta brikslið hevði ljóðað. Hóast dysturin var móti yvirvaldinum, so stríddi, tacklaði og spældi AB seg til sigurs. Ein sigur, sum í fyrstu atløgu sendir teir víðari í steypakappingini, men sum sálarliga man hava nógv størri týdning enn so.

AB prógvaði nevnliga, at teir ikki verða so léttir at syfta, sum fleiri halda, og tann boðskapurin man meira enn nakað rætta ryggin á øllum argjamonnum, sum spáka sær yvir um brúnna komandi vikuna.

**B36-AB 1-3 (1-0)**
1-0: Ovi Nysted
1-1: Hendrik Rubeksen, (br.)
1-2: Fróði Clementsen
1-3: Súni Fríði Barbá



*Fagnaðurin var øgiligur í vestara skýlinum í Gundadali, har AB-viðhaldsfólkini – tey rópa seg Frensusin - hildu til*
*Mynd: Einslistir*

## TB og Skála víðari

**Bæði TB og Skála megnaðu at spæla seg víðari til triðja umfar í steypakappingini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

TB hevði eisini hesa ferð heimavøll móti liði úr 1. deild, og eisini hesa ferð gjørdist talan um heimasigur.

Hesin var eisini av tryggara slagnum, tí hóast SÍ royndi at stríðast ímóti, so megnaðu teir ikki at standa móti trýstinum frá heimaliðnum, sum vann dystin 4-0.

Á Skála kom bert tað eina málið, tá Skála tók móti FS Vágum 04. Hetta kom fyri steðgin, og var tað Alexandur Johansen, sum stóð fyri hesum. Vágamenn royndu til tíðir at trýsta, men tað eydnaðist teimum tó ikki at fáa málið, sum kundi tryggjað teimum longda leiktíð. Hinvegin hevði Skála eisini sínar møguleikar, so sigurin hjá heimaliðnum var sum so í lagi.

Soleiðis verða bæði TB og Skála við í pottinum, tá lutur skal kastast um fjórðingsfinalurnar í steypakappingini.

**TB-SÍ 4-0 (1-0)**
1-0: Bergleif Sólsker
2-0: Kaj Roest
3-0: Kaj Roest
4-0: Allan Poulsen

**Skála-FSV 04**
**1-0 (1-0)**
1-0: Alexandur Johansen